MIÐVÁGS KOMMUNA

# Barnaansingin

Søkt verður eftir niðanfyristandandi starvsfólkum til barnaansingina í Miðvágs kommunu:

## Pedagogar til Útibarnagarðin í Miðvági:

Útibarnagarðurin er ein nýggjur kommunalur stovnur, sum lat upp í aug. 2003.

**Stovnslýsing:**
Í útibarnagarðinum ganga eftir summarfrítíðina uml. 64 børn í aldrinum 3-7 ár, og her starvast 11 sera fittlig fólk, 3 mannfólk og 8 konufólk.

**Barnagarðurin er skipaður soleiðis:**
- Á **Loftinum** ganga 20 børn í aldrinum 5-7 ár.
- Á stovuni hjá **Ternunum** ganga 15 børn í aldrinum 3-5 ár
- Á stovuni hjá **Títtlingunum** gang 15 børn í aldrinum 3-5 ár.
- Á stovuni hjá **Spurvunum** ganga 10 børn í aldrinum 3-5 ár

Talan er um eitt varðaleiðarastarv á 40 t. og 4 pedagogstørv á uml. 30 tímar:
Størvini eru leys frá 18. aug. Um ongin pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett ístaðin.

**Vit vænta av tær:**
- At tú hevur góð samstarvsevnir og ert álítandi.
- At tú ert sjálvstøðug(ur)
- At tú tekur ábyrgd og hevur gott yvirlit í tínum arbeiði
- At tú ert nærverandi og vísir umsorgan fyri hvørjum einstakum barni.
- At tú vísir áhuga fyri tínum arbeiði og hevur hug, hegni og ikki minst hugflog at arbeiða við børnum.
- At tær dámar at vera úti og tekur náttúruna sum ein týðandi og sjálvsagdan part í arbeiðinum.

Meira fæst at vita um størvini, við at venda sær til leiðaran Elsa M. Davidsen á tlf. 333738/223429.

Umsóknir við møguligum prógvum, royndum og viðmælum skulu vera Barnagarðinum í Miðvági í hendi seinast 28. juni 04.

## Leiðari til dagrøktarskipanina í Miðvági

Dagrøktarskipanin hevur virkað síðan 1985. Í skipanini eru 9 dagrøktarar og 29 børn í aldrinum 0-3 ár. Arbeiðstíðin er 30 t. um vikuna, ella eftir nærri avtalu, og verður starvið sett 16. aug. 04.

Leiðarin hevur fakligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av skipanini. Leiðarin samskipar eisini arbeiði hjá dagrøktarunum í tí tilhoyrandi spælistovuni.

Vit vænta av tær, at tú á ein leiðandi og virknan hátt, saman við dagrøktarunum, kanst tryggja skipanini eina positiva menning. Tað er umráðandi, at tú hevur góð samstarvsevnir, ert sjónlig(ur) í tínum arbeiði og dugir at fáa tíni sjónarmið fram.

Umsóknir við møguligum prógvum, royndum og viðmælum skulu vera Miðvágs kommunu í hendi seinast 5. juli.
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til dagrøktarleiðaran á tlf. 332960.

## Leiðari og hjálparfólk til frítíðaransingina í Miðvági

Frítíðaransingin fyri skúlabørn í 1. og 2. flokki byrjar aftaná summarfrítíðina í MB-húsinum. Frítíðaransingin er normerað til 20 børn.

Frítíðaransingin liggur í sera barnavinarligum umhvørvi, har stutt er til haga, fjals og fjørðu.

Søkt verður eftir leiðara at byrja 2. aug. 04 og hjálparfólkum at byrja 12. aug. 04. Leiðarin hevur fakligu, fíggjarligu og annars dagligu leiðsluna av ansingini.

**Vit vænta av tær:**
- at tú hevur góð samstarvsevnir og ert álítandi
- at tú ert sjálvstøðug(ur), vísir ábyrgd og hevur gott yvirlit í tínum arbeiði
- at tú ert nærverandi og vísir umsorgan fyri hvørjum einstakum barni
- at tú vísir áhuga fyri tínuma arbeiði og hevur hug, hegni og ikki minst hugflog at arbeiða við børnum
- at tær dámar at vera úti og tekur náttúruna sum ein týðandi og sjálvsagdan part í dagliga arbeiðinum.

**Umsóknir við møguligum prógvum, royndum og viðmælum skulu vera Miðvágs kommunu í hendi seinast 5. juli 04.**

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 283, P/F Alma Maskinverkstaður & Smiðja, 100 Tórshavn

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Óluva Josefina Waagstein, Ægishædd 3, 100 Tórshavn.
**Innkomin í nevndina:** Eigil Waagstein, Østre Kirkevej 15, DK-4000 Roskilde.

*Skráseting Føroya*
*tann 16. juni 2004*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2172, P/F J.F. Kjølbro Heilsøla, 700 Klaksvík.

**Viðtøkur broyttar:**
12.03.2004
**Kapitalur:**
Hækking við kr. 500.000,00 til kr. 1.000.000,00
**Inngjaldingarháttur:** kr. 500.000,00 við grunshækking

*Skráseting Føroya*
*tann 17. juni 2004*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2329, P/F Útferðir, 100 Tórshavn

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Kári Dalsgaard Petersen, Álvastígur 11, 100 Tórshavn.
**Innkomin í nevndina:** Jákup Højgaard, Magnus Heinasonargøta 6, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya*
*tann 16. juni 2004*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1914, P/F Torvanes, 470 Eiði

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Simon Pauli Ejdesgaard, 470 Eiði.
**Innkomin í nevndina:**
Dánjal Jákup Hammer, 470 Eiði.

*Skráseting Føroya*
*tann 16. juni 2004*
*Kristin Balle*

---

# Bilar til sølu

**Opel Vectra 1.6 bensin st.car persónbilur**



· Árgangur 2001 · Km 46.045
· Airconditon, radio, bagaguskjúlara, takboylar · Vælhildin

**prísur 158.500,-**

**Ford Escort 16V**



· Árgangur 1995 · Km 128.103
· Krók, stereoanlegg · Nýlakkeraður

**prísur 58.000,-**

**Citroen Xsara diesel**



· Árgangur nov 2001 · Km 30.000
· El-rútar, hita í setrum, aircondition, fjarstýrt centrallás, góð summardekk, góð píkadekk á felgum fylgja við · Vælhildin

**prísur 135.000,-**

**KIA Clarus 2.0 bensin**



· Árgangur jul 1997 · Km 125.000
· El-rútar framman, fjarstýrt centrallás, Pioneer anlegg, sportfelgur við góðum summardekkum, góð píkadekk fylgja við · Vælhildin

**prísur 85.000,-**

**Ford Escort CLX 1.8 Diesel**



· Árg. 96 · Km 122.000 · hátalarar 200 watt og originalt Ford radio-/bandspælari, sportfelgur við lágprofil summardekkum. Píkadekk á felgum fylgja við. Vælhildin.

**prísur 55.000,-**

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla
Tel 31 10 13 · Fartel 51 10 13
Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2591, Sp/f Circle, 850 Hvalba

**Viðtøkur broyttar:**
07.06.2004
**Nytt roknskaparár:** 01.04.-31.03.
**Umleggingarár:** 01.06.2003-31.03.2004.

*Skráseting Føroya*
*tann 17. juni 2004*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1822, P/F Jógvan Weihe, 100 Tórshavn

**Nevnd:**
**Innkomin í nevndina**:
Gunnar Oluf Weihe, Jørundargøta 62, 188 Hoyvík.
**Stjórn:**
**Innkomin sum stjóri:**
Ólavur Weihe, Undir Heygnum 39, kj., 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya*
*tann 17. juni 2004*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3219, Sp/f O. S. Firmavask, 350 Vestmanna

**Viðtøkur broyttar:**
09.06.2004
**Nýtt navn:** Sp/f A. T. Bókhald
**Nýggj adressa:** Bakkavegur, 625 Glyvrar
**Nýggjur Heimstaður:**
Runavíkar Kommuna
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Olaf Hilbert Simonsen, Úti á Mørk, 350 Vestmanna.
**Innkomin sum stjóri:** Anita Tausen, Undir Nesinum, 650 Toftir.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka bókhaldsvirki og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya*
*tann 17. juni 2004*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1828, Sp/f KG 476, 700 Klaksvík

**Viðtøkur broyttar:**
29.05.2004
**Endamál:**
Endamál felagsins er at reka fiskivinnu, persónsflutning, eiga og reka fasta ogn og partabrøv umframt annað virksemi, sum er tengt at hesum vinnum.

*Skráseting Føroya*
*tann 17. juni 2004*
*Kristin Balle*

---

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

Sí SVF tekstvarp s. 650



# Hús í Hoyvík



Við hesum verður sethúsaognin Kristiansgøta 40, 188 Hoyvík, lýst til sølu, um hóskandi boð fæst.

Grundøkið, matr. 1 tp, Hoyvík, er 536 m$^2$.
Húsini eru í einari hædd á 137 m2 við lágari reising.

Húsini eru innrættað soleiðis:
Gangur, køkur, vaskirúm, baðirúm, 2 kømur, hjúnarúm við wc/brúsu og stór stova. Trappa er upp á loftið, kamar og rúm úti á lofti er gjørt í fjør. Pláss er fyri einum kamari afturat.

Húsini eru bygd í 1990, takið er skift fyri 2 árum síðani. Ventilatión er í húsinum.
Stórt bilhús er á grundøkinum.
Húsini standa í friðarligum og barnavinarligum umhvørvi ovast á Løgmannabreyt.

Nærri upplýsingar um ognina fáast frá undirritaðu.

**Advokatskrivstovuna**
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145
Fríða Patursson, adv.
teldupostur: frp@jura.fo

---

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Lærari til el-deildina

Starvið, sum er **tíðaravmarkað** til 1/2 ár, umfatar undirvísing á el-deildini.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum eletrikari og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið. Fyrimunur er at hava prógv sum el-installatørur. Neyðugt er at umsøkjarin hevur hollan kunnleika til nýggjastu tøknina á el-økinum. Eisini er áhugi fyri stødd- og alisfrøði, og nýtslu av EDV, ein fyrimunur.

*Á el-deildini starvast 5 lærarar í føstum starvi, umframt tímalærarar og verkstaðarhjálpari. Næmingarnir læra til elektrikara og ganga í skúla í 55 vikur, ella eru SIT-næmingar, sum ganga í skúla í 1 ella 2 ár.*

Løn:
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Starvið skal setast 9. august 2004.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 25. juni 2004.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jógvan Sørin Hansen, leiðari lærara á el-deildini, á tlf. 31 19 57 ella 22 37 28.

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 239
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 311957 · Telefaks +298 316621
e-mail: tst@tst.fo

---

*Miðvágs-Sandavágs skúli*



# Miðvágs-Sandavágs skúli

Vegna farloyvi, lækkað tímatal, avlopstímar og næmingar við serligum tørvi verða hesi lærarastørv lýst leys at søkja

**tíðaravmarkað til skúlaárið 2004/2005:**
- 1 fulltíðarstarv fyri lærara í farloyvi
- 1 fulltíðarstarv fyri lærara í barnsburðarfarloyvi
- 1 starv 12 - 18 t/v
  serstakliga tørvar okkum lærarar, ið kunnu undirvísa í ítrótti/svimjing dreingir.
- 1 starv 4 t/v at gera SI venjingar
- 1 starv sum sergreinalærari 6 t/v at undirvísa í motorlæru.
- 1 starv sum sergreinalærari 4 t/v at undirvísa í sjóvinnu.

**Tíðaravmarkað 01.08.2004 - uml. 20.01.2005.**
- 1 starv fyri lærara í barnsburðarfarloyvi
  Í tímatalvuni er m.a. hondarbeiði, lívfrøði, ítróttur/svimjing gentur.

**Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.**

- 1 starv sum stuðul 17 t/v

**Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.**

Nærri fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á tlf. 33 28 20 ella 21 88 20.

Umsóknir skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 28. juni 2004.

**Skúlastýrið fyri**
**Miðvágs-Sandavágs skúla**
**v/ Gitte Samuelsen**
**FO 360 Sandavágur**

---

**Búskaparfrøðingur**

Landsbankin søkir eftir búskaparfrøðingi.

**Arbeiðsuppgávur:**
Skriva frágreiðingar um føroyskan búskap og fíggjarviðurskifti. Annars at arbeiða við øðrum slagi av kunning, ma. umvegis heimasíðu landsbankans.

Aðrar uppgávur snúgva seg um, at arbeiða við búskaparmyndli og at arbeiða við at menna føroyska kredit- og kapitalmarknaðin.

Arbeiðið er býtt í ábyrgdarøki, men stovnurin er lítil og uppgávurnar breiðar. Tí verður nógv arbeiði gjørt í verkætlanum, eins og tað er skiftandi.

**Førleiki:**
Umsøkjarar skulu hava kandidatprógv í búskaparfrøði ella aðra líknandi útbúgving.

**Løn:**
Eftir avtalu við støði í sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingarfelagið.

**Tíðarfreist o.a.:**
Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Sigurd Poulsen, stjóra (sigurd@landsbank.fo) ella Jens Erik Magnussen, undirstjóra (jem@landsbank.fo) um fleiri upplýsingar á tlf. 318305.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu saman við neyðugum upplýsingum um útbúgving og størv sendast landsbankanum áðrenn 02.08.2004 kl 16:

Landsbanki Føroya
Governmental Bank

Müllers Hús - Gongin
Postrúm 229 - FO-110 Tórshavn
E-postadr.: landsbank@landsbank.fo

*Landsbanki Føroya er bankasamband landsins. Hann umsitur gjaldføri og stendur fyri lántøku landsstýrisins og samstarvar við aðrar myndugleikar og almennar stovnar.*

*Landsbankin virkar fyri tryggum fíggjarviðurskiftum í landinum. Bankin skal tí halda seg kunnaðan um fíggjarmarknaðarviðurskifti og samstarva við fíggjarstovnar og landsstýrið um hesi viðurskifti. Lýsingar av búskapinum eru týðandi liður í hesum uppgávum. Sí eisini heimasíðuna http://landsbank.fo*

---

# Ólavsøkuframsýningin 2004

**Listafelag Føroya skipar fyri ólavsøkuframsýning í Listaskálanum. Øll kunnu senda verk til ólavsøkuframsýningina.**

Verkini skulu vera í hendi í seinasta lagi 18. juli. Saman við verkunum skal vera listi yvir tøkni, heiti og prís, og øll verk skulu vera týðiliga merkt samsvarandi listanum.

Tilmeldingarblað til framsýningina fæst í Listaskálanum.

Myndir undir glasi skulu hava rammu.

Listafelagið setir eina nevnd at skipa fyri framsýningini, og tilskilar sær rætt til at taka dagar í, hvussu úrval og samanseting skulu vera.

**Listafelag Føroya**
Gundadalsvegur · Postsmoga 1141
FO-110 Tórshavn · Telefon 313579

*Listaskálin er opin mánadag-fríggjadag kl. 11-17, leygardag og sunnudag kl. 14-18.*

---

# Mini gravmaskina

Alt arbeiði við mini gravmaskinu verður gjørt, so sum urtagarðar, smáir vegstubbar, grava fyri kaðalum, grava út fyri bilhúsum o.a.

Arbeiði við brekkara verður eisini gjørt.

**Fa. Hans P. Hansen**
477 Funningsfjørður
Fá meira at vita á tlf. 212631 ella 441631

*Vit taka minstu uppgávur í størsta álvara.*

---

*Gravarhjálp*

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*www.gravarhjalp.net*

Sosialurin 341800